Sosialurin

Nr. 53 - 17. mars 2010







# Bilar og Bilradio í Bella


*Á bilaframsýningini í Bella Sentrinum eru bilar av øllum sløgum. Her er ein Ferrari F430*


*Lamborghini sportbilar í fleiri útgávum*


*Ellisakfør eru eisini við á framsýningini*

**Bilredaktiónin hjá Sosialinum og Rás2 verður við á stóru bilaframsýningini “Biler i Bella” í Bella Centrinum á Amager, sum verður um vikuskiftið**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í morgin hósdagin 18. mars lata dyrnar upp til størstu donsku bilaframsýningina “Biler i Bella” í Bella Centrinum á Amager.

Biler i Bella, ið er største bilaframsýning sum hevur verið fyriskipað í Danmark, verður frá 18.-21. mars við øllum teimum nýggjastu bilunum og sum nakað nýtt - eisini motorsúkklum

Á framsýningini verður alt frá teimum nýggjastu og kvikastu sportbilunum til praktiskar familjubilar, umframt at motorsúkklur nú eisini verða sýndar fram fyri fyrstu í Biler i Bella.

Eisini verður ein serligur básur ið nevnist “Ny teknologi”, har alt tað nýggjasta innan alternativ brennievni verður sýnt fram sum t.d. bilar sum verða drivnir við el, brint og hybridbilar.

Framsýningin Biler i Bella er opin í fýra dagar, frá hósdegnum 18. mars til og við sunnudagin 21. mars.

Í bilasíðunum í Sosialinum mikudagin 24. mars og á Bilradio á Rás2 hósdagin 25. mars verða frásøgnir frá Biler i Bella.



# VW Touareg Hybrid

**Nýggi Volkswagen Touareg, sum kemur á marknaðin í summar, verður umframt bensin og diesel eisini at fáa sum hybridbilur**

Samstundis sum Volkswagen sýna fram eina nýggja útgávu av Touareg, kemur bilurin eisini í eini hybridútgávu við el- og bensinmotori, sum koyrir upp til 50 kilometrar upp á elmegi, áðrenn bensinmotorurin fer í gongd. VW Touareg kemur eisini í eini sera økonomiskari dieselútgávu við V6 TDI motori.

Bæði Touareg Hybrid og Touareg V6 TDI, verða millum mest økonomisku bilar í sínum klassa, sum verða gjørdir í Evropa. Nýggi VW Touareg kemur á marknaðin síðst í mai.

**mg**

# Astrid og Toyota Aygo

Lokalblaðið Budstikken, sum kemur í hvørt hús í Vejle og Kolding, skrivar um Astrid Kougios Pedersen úr Vejle, sum vann høvuðsvinninginum ein Toyota Aygo frá Reyni Service, í íløguspælinum hjá Føroya Banka.

Tá íløguspælið hjá Føroya Banka var av mikudagin 3. februar 2010, var var tað danska Astrid Kougios Pedersen úr Vejle, sum vann høvuðsvinningin - ein Toyota Aygo frá Reyni Service. Á øðrum plássi endaði Kári Vitalis, sum fekk íløguprógv á 15.000 krónur frá Føroya Banka, og triðja pláss fekk Marius Fríðálvur Joensen, sum fær íløguprógv á 10.000 krónur. Tilsamans vann Astrid 110.000 kr. í tíðarskeiðnum, sum íløguspælið vardi. Hon byrjaði við 250.000 kr. og endaði við 360.000 kr.

**mg**


*Astrid Kougios Pedersen úr Vejle við sínum Toyota Aygo, sum var høvuðsvinninginum í íløguspælinum hjá Føroya Banka*


Færøsk bank byder på udvikling og sund bankdrift

Sparbank har solgt 12 filialer til Føroya Bank. En bank, der er glad for at komme ind på det danske marked, og som satser på udvikling og god, gammeldags bankdrift